# Steðgið harðskapi móti kvinnum




## Amnesty International fer undir heimsumfatandi átak

*Harðskapur móti kvinnum er ein sjúka, sum etur mergin í øllum samfeløgum í øllum heimsins londum, segði Irene Khan, aðalskrivari í Amnesty International, tá ið heimsumfatandi átakið varð sett í gongd á tíðindafundi í London tann 5. mars.*

*Bæði í friðartíð og tá ið kríggj herja eru kvinnur fyri ógvusligum ágangi, bara tí tær eru kvinnur. Milliónir av kvinnum verða bukaðar, neyðtiknar, myrdar, álopnar og meiðslaðar, og rætturin at liva verður í mongum førum noktaður teimum. Í minsta lagi ein av hvørjum trimum kvinnum í heiminum eru fyri álvarsligum harðskapi í teirra lívi.*

*Amnesty International heitti á allar menn og kvinnur um at standa saman um at steðga hesi ræðuligu skomm í okkara tíð.*

*"Hetta er ikki nakað, sum bara hendir aðrastaðni, tað hendir eisini her. Tað er ikki bara nakað, sum hendir øðrum, tað hendir eisini tær, vinum tínum og tíni familju. Ikki fyrr enn vit øll, menn eins væl og kvinnur, siga: "nei, eg vil ikki, at hetta skal henda", kunnu vit gera enda á harðskapinum" segði Irene Khan.*

*Amnesty International hevur í sambandi við átakið givið út frágreiðingina It is in our hands - Stop violence against women. Niðan fyri er inngangurin, sum Irene Khan hevur skrivað.*

### TAÐ ER Í OKKARA HONDUM

Eftir Irene Khan, aðalskrivara í Amnesty International

Í fjør hitti eg Jamilu í kvinnufongslinum í Kabul, eina 16 ára gamla afganska gentu. Fongslið var fult av kvinnum, ákærdar fyri ótrúskap, fyri at rýma frá harðligum monnum ella fyri at vilja giftast manni, tær sjálvar høvdu valt. Jamila varð burturflutt úr heimi sínum í Kunduz árið fyri, noydd at gifta seg, misnýtt og neyðtikin. Tá ið pápabeiggi mann hennara hótti við at neyðtaka hana, orkaði hon ikki longur og tók til rýmingar. Men løgreglan handtók hana og sendi hana í fongsul fyri at vera rýmd frá manni sínum. Jamila segði fyri mær, at hon vildi sleppa heimaftur til foreldur síni, men hon óttaðist fyri, at pápin skuldi drepa seg, tí hon, eftir hansara tykki, hevði dálkað æruna hjá ættini. Drap hann hana ikki, so fór maðurin, hon hevði verið noydd at gift seg við, heilt vist at gera tað. Hennara ótti var ikki ógrundaður. Fyrr sama árið hevði afganski forsetin, Hamid Karzai, givið einum 20 kvinnum grið, kvinnum í somu støðu sum hon. Fleir teirra høvdu teirra egnu familjur síðani dripið, aðrar vóru "horvnar". Men hóast alt hetta lýstu eygu hennara vónrík, tá ið hon segði mær, at ein dagin fór hon at sleppa úr fongslinum, giftast manni, hon sjálv valdi sær, og liva eitt frælst lív.

Eg hitti ongantíð Palomu, men mamma hennara segði mær hennara søgu. Paloma var ein av fleiri hundrað ungum kvinnum, sum vórðu myrdar í býnum Ciudad Juárez á markinum millum Meksiko og USA. Í eini 10 ár høvdu kvinnur verið burturfluttar, píndar, neyðtiknar og dripnar. Myndugleikarnir gjørdu lítið við at kanna, reisa ákæru ella steðga hesum brotsverkum, tí hetta vóru fátækar, máttleysar kvinnur við ongari politiskari ávirkan. Nógvar vóru komnar til Ciudad Juárez fyri at arbeiða í *maquiladoras* -verksmiðjum, sum altjóða fyritøkur hava bygt á meksikanska markinum fyri at fáa fyrimun av lágum skatti og ódýrari meksikanskari arbeiðsmegi. Ungar kvinnur sum Paloma leitaðu til hesa lokkandi vinnuna fyri at bøta um síni livikor, men gjørdust í staðin offur fyri alheimsgerðini. Tað, sum var sermerkt í hesum máli, var dirvið hjá mammunum at teimum, ið vórðu dripnar í Ciudad Juárez. Tær hava skipað seg og stríðast fyri rættvísi. Saman við teimum og øðrum eydnaðist tað Amnesty International at noyða stjórnina í Meksiko til í fjør at taka málið upp og gera eina roynd at steðga hesum drápum.

Søgurnar um Jamilu og Palomu eru bara tvey dømi av fleiri milliónum í teimum skammiligastu mannarættindabrotunum í okkara tíð: harðskapinum móti kvinnum.

Kvinnur í Asia og Miðeystri verða dripnar, tí víst verður til æru. Gentur í Vesturafrika verða kynsliga meiðslaðar, tí víst verður til siðvenju. Kvinnur, ið koma til Vestureuropa at leita sær arbeiði ella sum flóttafólk, verða álopnar, geva tær seg ikki undir teir sosialu siðirnar í londunum, tær koma til. Ungar gentur í Suðurafrika verða neyðtiknar og smittaðar við HIV/AIDS, tí at gerningsmenninir halda, at kynsligt samband við jomfrýr er heilivágur móti sjúkuni. Og í ríkastu og mest framkomnu londunum í heiminum verða kvinnur bukaðar til deyðis av monnum sínum.

Hesin harðskapur trívist, tí at ov nógvar stjórnir látast ikki at síggja hann og loyva, at hetta fer fram órevsað. Í ov nógvum londum gera lógir, umsiting og vanar mun á monnum og kvinnum, forða fyri javnstøðu teirra millum og koma kvinnunum í vanda fyri harðskapi. Í ov nógvum londum eru kvinnur fangaðar í fátækradømi, sum hevur harðskap við sær. Ov ofta geva siðir og samfelagsskipan monnum ræði á lívi og kroppi hjá kvinnum. Í ov nógvum samfeløgum fremja átrúnarleiðarar og fjølmiðlar hugburðir og siðvenjur, sum niðurgera og kúga kvinnur. Ov ofta bróta vápnaðir bólkar alment galdandi mannarætt og brúka neyðtøkur sum vápn í kríggi fyri at spotta og vinna á sínum fíggindum, og ov ofta eydnast teimum at sleppa undan órevsaðir.

Tann skjóti vøksturin í tali á løttum vápnum, hernaðargeringin av mongum samfeløgum og afturstigini í mannarættindunum í sambandi við "kríggj móti yvirgangi", alt hetta ger bara støðuna hjá kvinnum verri.

Mannarættindi eru heimsumfatandi, og harðskapur móti kvinnum hevur gjørt hesi brot á mannarættindi heimsumfatandi. Kvinnur úr ymiskum londum og ymiskum heimspørtum, við ymiskum átrúnaði, ymiskari mentan og samfelagsligari støðu, útbúnar ella ikki, annaðhvørt tær liva mitt í kríggi ella í friðartíð: allar eru tær bundnar saman við einum felags bandi av harðskapi - ofta í hondunum á stjórn ella vápnaðum bólkum, samfelagi ella egnari familju.

Tann størsta avbjóðingin móti hesari plágu er komin frá einstøkum kvinnum og kvinnubólkum, sum hava gjørt vart við seg og talað at, ofta við at seta lívið í váða. Tær hava skipað seg og kravt rættvísi. Tær hava kravt, at mannarættindi teirra verða vird og vard. Tað er teimum fyri at takka, at týðandi framstig eru gjørd í altjóða sáttmálum og skipanum, lógum og politiskum ætlanum. Men hesi framstig formáa sær óhugnaliga lítið í mun til




*Vit vilja stríðast fyri rættinum hjá kvinnum til politiska og fíggjarliga javnstøðu. Vit vilja seta spurningar við átrúnarligar, sosialar og mentanarligar vanar, ið seta kvinnur til viks og eru hóttan ímóti teimum. Vit vilja virka fyri at fáa enda á líkasæluni, sigur Amnesty International í heimsumfatandi átakinum*

tann veruliga tørvin, tí tey lyfti, tey boða, hava so ringt við at gerast meira enn bara vónir.

Altjóða sáttmálar og skipanir koma bara til nyttu, verða tær settar skilvíst í verk. Annars eru tær bara orð. Lógir og politiskar ætlanir geva bara verju, verða tær virdar. Annars eru tær bara prentað skriv. Mannarættindi eru bara verulig, geva tær javnbjóðis og felags verju. So avbjóðingin er framvegis at virka fyri broytingum, sum kunnu gera veruligan mun í lívinum hjá kvinnum. Hetta er tað, sum kvinnur um allan heim stremba eftir í dag.

Við átakinum *Steðgið harðskapi móti kvinnum* leggur Amnesty International sína egnu rødd til hesa stremban. Vit hava arbeitt saman við fjøld av fólki innan fyri og uttan fyri Amnesty International fyri at seta í verk hetta fjølbroytta átakið at fáa í lag broytingar á altjóða stigi og í teimum einstøku londunum og samfeløgunum gjøgnum mangar luttakarar og mong tiltøk.

Vit heita á leiðarar, felagsskapir og einstaklingar um alment at streingja á fyri at gera mannarættindi til veruleika fyri allar kvinnur. Vit vilja ávirka stjórnir til at undirskriva ST samtyktina um avtøku av øllum mismuni mótvegis kvinnum og tær samsvarandi sjálvbodnu reglurnar uttan at taka fyrivarni. Í summum londum fara vit at virka fyri avtøku av lógum, ið gera mun á monnum og kvinnum, og sum halda harðskapinum uppi. Í øðrum londum fara vit at heita á stjórnirnar um at seta í verk lógir, sum verja kvinnur og revsa neyðtøku og onnur sløg av kynsligum ágangi. Vit fara at lurta eftir tí, sum kvinnur hava at siga, arbeiða saman við teimum og hjálpa teimum við at skipa seg. Vit fara at seta okkum í samband við felagsskapir og myndugleikar á staðnum fyri at fáa stuðul til tiltøk, ið gera tað møguligt hjá kvinnum at liva við ongum harðskapi.

Vit vilja stríðast fyri rættinum hjá kvinnum til politiska og fíggjarliga javnstøðu. Vit vilja seta spurningar við átrúnarligar, sosialar og mentanarligar vanar, ið seta kvinnur til viks og eru hóttan ímóti teimum. Vit vilja virka fyri at fáa enda á líkasæluni, sum valdar, annaðhvørt harðskapurin fer fram á vígvøllinum ella í sovikamarinum.

Vit vilja vinna undirtøku frá monnum. Eisini menn pínast, tá ið kvinnur eru fyri harðskapi, og nógvir teirra eru uppi í arbeiðinum at fordøma og útrudda harðskap móti kvinnum.

Endamálið við okkara átaki er ikki at avmynda kvinnur sum offur og lýsa mannfólk sum brotsmenn. Endamálið er at fordøma harðskapin í sjálvum sær. Tað fer at krevja, at vit øll broyta hugsan, ikki bara sum felagsskapir og stovnar, men eisini sum einstaklingar.

Hetta átakið líkist frá øllum øðrum, sum vit áður hava sett í verk, tí tað heitir á hvønn einstakan okkara um at taka ábyrgd. Harðskapur móti kvinnum endar ikki, fyrr enn hvør einstakur er til reiðar at siga við seg sjálvan: ger tað ikki, loyv ikki øðrum at gera tað ella tola tað, og gevst ikki, fyrr enn endi er fingin á tí.

Harðskapur móti kvinnum finst um allan heim, men sleppast kann undan honum. Vit kunnu gera enda á harðskapi móti kvinnum, og við tykkara hjálp fara vit at gera tað.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Gøran Wennerstrøm:

# Kosin »Ársins álitisfólk«

Gøran Wennerstrøm varð á aðalfundi hjá Starvsmannafelagnum valdur til "Ársins áltisifólk".

Grundgevingarnar fyri, at Starvsmannafelagið valdi Gøran Wennerstrøm til ársins álitisfólk eru hesar:

*Við ágrýtni, eldhuga og nærlagni hevur hann røkt starv sítt sum álitisfólk, og verið mongum til fyrimynd í fakfelagsliga starvi sínum.*

Gøran siglir sum dekkari við Smyrli, og var valdur til álitsifólk í oktober 2001.

Hann byrjaði at sigla hjá Strandferðsluni í 1991og sigldi til 1994, tá hann flutti til Danmarkar, har hann sigldi við DSB og DFDS í seks ár, til hann í 2000 flutti heim aftur til Føroya og fór aftur í starv hjá Strandferðsluni. Síðani hevur Gøran siglt við Smyrli.

Gøran, sum er føddur 10.november 1964, býr saman við Leilu, og eiga tey tvey børn, Høgna, sum er 12 ár og Silju, sum er 1 ár.



*Gunleiv Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, h.m. handar gávu og blómur til Gøran Wennerstrøm, sum er kosin "Ársins álitisfólk"*

*Mynd: Starvsmannafelagið*

## Til minnis um
# Ditlev Olsen,
## fyrrverandi skúlastjóra



Ditlev var føddur 26. janaur 1923 – í Funningi. Lítil var hann, tá hann misti pápan, sum liggur jarðaður í Reykjavík.

Mamman gav ikki upp, men fór til Havnar ar arbeiða soleiðis, at hon kundi breyðføða seg og børnini bæði.

Ditlev for á læraraskúlan og fekk prógv í 1946. Fyrstu árini var hann lærari í Leirvík. Har fann hann sær ta vøkru ungu Margit, sum kom at fylgja honum alt lívið. Tey fóru bæði til Danmarkar á deyvaskúlan á Kastelvegnum. Har komu tey at hitta deyvar føroyingar, t.d. Oddvør úr Sandavági, Súsonnu hjá Trygva o.o.

Men so kemur ein áheitan til Ditlev, um at fara til Føroyar at kanna, um tað var tørvur á deyvaskúla. Hetta er eftir, at Annelena og Jákup í Gøtu høvdu sent 5 av teirra børnum, sum vóru deyv til Danmarkar.

Jú, endin verður, at skúli fyri hoyri- og talibrekað verður settur á stovn, í oktober 1962. Áðrenn Ditlev kom til Føroya vóru flest brekað – deyv – blind – rørslubrekað og menningartarna – send til Danmarkar, tí ongin skúli kundi hava tey.

Fyrstu tíðina vóru tey tveyeini – tað var til stóra gleði og signing.

Undirritaða var so heppin at fáa arbeiði á hesum skúla. Eg nýti høvi til at takka teimum báðum fyri teirra ótroyttiliga arbeiði fyri at fáa tað besta burtur úr. Tað næstbesta kundi ikki brúkast: bara tað besta. Hetta var ein spennandi tíð, tí hetta var alt nýtt, og skuldi byggjast upp av nýggjum. Av tí, at tað tíbetur vóru so fá, so komu tey at ganga á sama stovni. Tað vísti teg seinri, at tað var ikki so galið – tvørturímóti.

Øll sóu, at næmingarnir trivust og lærarnir trivust, so har skuldi nakað gott koma burtur úr. – Ikki eru tey fá, sum støkka inn á gólvið enn. Eisini eitt annað var, her støðaðust lærararnir væl og leingi.

Alt vóru ikki reyðar rósur, nei, tí nú knappliga høvdu nøkur funnið útav, at tað var ikki gott fyri børn at fara heimaní frá. Eingin hevði gjørt vart við hetta tá børnini vóru send til Danmarkar. Vit líknaðu Ditlev við Jósva – múrskeiðini í aðrar hondini og svørðinum í hinari.

Vit høvdu eitt sera gott samstarv og stóðu sum ein maður, tá ið »sjógvarnir brutu«.

Eitt, sum var sera gott, og tað var at Margit var ein so ómetaliga góður stuðul bæði í skúla og ikki minst heima.

Hesi seinastu árini var Ditlev illa sjúkur, og nú var Margit aftur bjargingin. Góða Margit eg virðismeti alt títt arbeiði sera høgt.

Ikki minst eftir, at Ditlev var so sjúkur. Og so her til seinast, at tað var so væl lagað, at tú vart hjá honum í hansara síðstu løtu – at hann doyði í ørmum tínum. Tað var vælsignað. Tú vart eisini sera takksom fyri hjálp frá versoninum, sum gjørdi alt, ið gerast kundi.

Bert spell, at tað verkið, sum Ditlev bygdi upp frá grundini, skuldi verða niðurbortið so skammiliga. Tað er tíverri so, at tað sum eydnast væl og gongur væl ikki má fáa loyvi til tað í Føroyum.

Eg takki Gudi fyri, at eg fekk ta gleði at arbeiða saman við Ditlev. Hann lærdi okkum nógv. Hann var sera góður við næmingarnar og annars alt starvsfólkið.

Vit hava nógv góð minni.

Góða Margit! Harrin styrki teg og øll tíni.

Tann deyva Ingeborg Næstved yrkti sangin »Mens jeg lever« hon sigur í einum ørindi.

*Så stakket er livet hernede,*
*og hvorfor forstår vi dog ej*
*af sol og af smil at sprede*
*eg væld på hverandres vej.*

Signað verður minnið um Ditlev. Hvíl í friði.

**Hanna Lisberg**

## Tøkk



Hjartans tøkk til KFUK og familju mína, sum umframt gávur góvu mær føðingardagshaldið og gjørdu mín 80 ára dag ógloymandi fyri meg.

Somu heilsan og hjartans tøkk gevi eg feløgum, stovnum, bløðum og tykkum mongu, sum vitjaðu niðan í KFUK henda dag.

Tøkk fyri gávur, røður, greinar, fjarrit og telefonsamrøður. Eg hevði ikki uppiborið bert ein evurslítlan part av øllum hesum, men inniliga tøkk!

Við ynski um signing Guðs.

**Vinarliga Jona**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða mamma, vermama, omma og langomma okkara

**Berghild Ingrid á Mýrini**

andaðist og varð jarðað.

Eina stóra tøkk til Ingu Poulsen Dam prest, fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni. Tøkk til kirkjutænarar og sangarar. Tøkk fyri blómur og kransar og til tykkum, sum lótu eina gávu til Meinigheitshúsið Saron. Somuleiðis ein tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Hergeir, Martin, Jónberg og Arndal**

### Dagurin

**9. mars. Fjøruti riddarar**, deyðir í 320. Keisarin Licinius gav boð um, at øll kristin skuldu avnokta trúnna. Fjøruti riddarar í Sebaste í tí núverandi Turkalandi vildu ikki gera eftir boðunum og vórðu settir naknir út á ein ísflaka, men teir valdu allir, uttan ein, heldur at frysta í hel enn at ganga frá trúnni. Sum veðrið var henda dagin, skuldi tað vera teir komandi 40 dagarnar.

*Sverri kongur Sigurðsson doyði í Bergen hendan dagin í 1202.*